## Viðmerking

# Tað veit Gud at haldi eg, hetta er kulasta kvinna eg havi møtt

Moldova er fátækt. Korruptiónin er stór. Tey ungu rýma. Russland hóttir. Men ein kvinna hevur sett sær fyri at stýra skútuni úr ódnini

Sjúrður Skaale

Í farnu viku var eg í Moldova og Ukraina við uttanríkisnevnd fólkatingsins (havi greitt frá um Ukraina í einum videobroti á FB).

Moldova er ikki bara fátækasta landið í Europa. Tað er eisini so gjøgnumsúrgað av korruptión, at tað illa kann kallast eitt rættarsamfelag.

Nakrir fáir oligarkar sita tungt á virðunum, og politiska skipanin er veik í mun til teir. Útlitini eru so vánalig, at sambært kanningum droyma 90% av teimum ungu um eina framtíð uttan fyri Moldova.

At vera í hesum landi er sum at vera í gamla Sovjettsamveldinum. Bygningarnir eru gráir og ljótir, og tað er einki veiggj í búskapinum.

Men nú er birt ein vón.

Fólk hugdu at baltisku londunum, sum inntil 1991 jú eisini vórðu trælkað undir sovjettkommunismuni. Men eftir at kommunisman fall blivu hesi lond limir í bæði NATO og ES. Tað gav tryggleika, stabilitet – og gjørdi, at útlendskir íleggjarar tordu at gera íløgur.

Moldova, hinvegin, varð verandi ein satelittstatur hjá Russlandi, hóast tað fekk formligt sjálvræði samstundis sum baltalondini. Hetta hevur forðað fyri tí áliti og tryggleika, sum er fortreytin fyri framburði.

Við baltalondum sum fyrimynd er vald ein stjórn, sum vil loysa Moldova frá Russland og nærkast Vesturheiminum.



Summi hava longu mist tað týdningarmesta. Hesin 17 ára gamli drongurin var einsamallur...



Maia Sandu, forseti, á fundi við okkum. ES flaggið aftanfyri hana ímyndar visiónina: Limaskap í ES og NATO. Hennara andlitsbrá er milt, men viljin er harður

Nú hevur Moldova formliga støðu sum umsøkjaraland til ES-limaskap, og stjórnin ger alt hon kann fyri at lúka strongu krøvini – ikki minst at basa korruptiónini.

### Russiskt mótsvar

Uppgávan er stór. Ikki bara tí korruptión er ring at basa, men eisini tí Russland aktivt roynir at køva strembanina. Hetta verður bæði gjørt við konstantari antivesturlendskari propaganda, við at rinda fólki reiðan pening fyri at stuðla russiskt-sinnaðum flokkum og á annan hátt.

Tá álvarsamasta slagið kom, tá vestansinnaða stjórnin tók greiða frástøðu frá innrásini í Ukraina. Tá keypti Moldova alt sítt gass úr Russlandi, og sum hevnd fyri politisku útlmeldingina hækkaði prísurin á gassi við 700% frá degi til dags. Seinni var veitingin eisini skorin við eini helvt.

Men í staðin fyri at bakka stóð Moldova fast, og frá at keypa 100% av gassinum úr Russlandi, er talið nú null prosent. Alt kemur aðrar vegir.

Óttin fyri beinleiðis russiskari innrás er sera stórur í Moldova, og fatanin er, at verður Putin ikki steðgaður í Ukraina, standa tey næst fyri tørni. Og so er fátæka landið givið upp til skutils. Tey hava onga kjans at verja seg.

Tí vóru boðini frá teimum, vit tosaðu við, púra greið: Stuðla tit Ukraina, so verja tit Moldova!

Og hóast Moldova sjálvt ikki kann veita Ukraina hvørki hernaðar- ella aðra hjálp, so taka tey eitt stórt tak: Meira enn ein millión ukrainskir flóttar eru farnir úr Ukraina gjøgnum Moldova, og lítla, fátæka landið hýsir sjálvt umleið 110.000 flóttum. Tey allar flestu búgva privat inni hjá fólki, og rinda eina lítla upphædd fyri tað. Men nøkur fá túsund búgva í smáum flóttafólkalegum.




Vit vitjaðu eina av hesum legum, har góðir 100 ukrainar húsast í nøkrum gomlum, frágingnum bygningum. Eldri, yngri og børn. Alt uttan menn í vápnaførum aldri. Tað var nemandi at síggja hesi stillu offur fyri Putinsa aggressión. Eg tók nakrar myndir, sum síggjast her.

### Sterkur forseti

Millum tey mongu vit hittu á túrinum, var sjálvur forsetin, Maia Sandu.

Hon er 51 ár, og hevði eitt gott starv í Heimsbankanum í Washington, tá hon tók við starvinum sum ráðharri í skúlamálum í 2012. Eisini á tí økinum var nógv korruptión, og tá skeiðið var liðugt, var talið á fólki, sum kláraðu ávísar útbúgvingar, lækkað úr yvir 90% og niður um 50%. Ikki tí fólk vóru vorðin dovnari ella býttari, men tí hon hevði forðað fyri, at foreldur keyptu prógv til síni børn.

Í 2016 stovnaði hon sín egna flokk. Í 2019 var hon eitt skifti forsætisráðharri. Í 2020 varð hon vald til forseta, og árið eftir vann flokkur hennara eisini greiðan meiriluta í parlamentinum.

Teirra høvuðsmálið er greitt: At basa korruptiónini í øllum landinum, loysa Moldova úr russiska takinum, og fáa limaskap í bæði ES og NATO. Tað er, segði hon, neyðugt um onnur skulu fáa álit á Moldova, so búskapurin kann vaksa.

Sandu er lítil kona. Hon tosar við blíðari rødd og mildum eygnabrá. Men hon er gróthørð, tá hon tosar um síni mál: Russiska ávirkanin skal skerjast. Valdið hjá oligarkunum, sum stýra nógvum, skal skerjast. Korruptiónin skal basast við harðari hond og hørðum revsingum.



Hetta er millum kulastu kvinnur, eg havi møtt, skrivar Sjúrður Skaale

Og har er langt á mál. Tá vit vitjaðu anti-korruptións deildina hjá stjórnini, hoyrdu vit um sølu av bæði próvtøku-prógvum og koyrikortum. Um russiskt-stuðlað fólk, sum vóru tikin meðan tey býttu pengar út til fólk undan einum vali. Ja, enntá um ein lækna, sum kravdi pening svart fyri at hjálpa eini kvinnu, sum skuldi eiga...

So Sandu er í hornatøkum við sterkar kreftir, sum einki vilja broyta, við ein veikan búskap, við eina sjúka mentan – og við tann ringasta granna, sum kann hugsast. Hann kallast Vladimir...

Men hon hevur framvegis stuðul millum fólk. Og hon tykist hava ein vilja úr stáli. Hon var imponerandi at tosa við – og tað hevur verið hugtakandi at lesa um hana aftaná.

Um hennara ætlan ber á mál er sera, sera óvist. Men tað veit Gud – eg haldi hon er ein tann kulasta kvinna, eg havi møtt.



Eldri fólk og kvinnur í leguni. Tað er bannað monnum í vápnaførum aldri at rýma úr Ukraina



Ein kvinna leggur mat uppúr til børn, sum eru flýdd úr Ukraina